## Høganes 125 ár

Nú sluppin Høganes er vorðin 125 ár, hevur nevndin í Felagnum Høganes avgjørt, at halda eina kvøldsetu í Løkshøll. Endamálið við felagnum er at byggja eitt savn – eitt vitjunarvert stað fyri ferðafólk á Skálafjørðinum. Á tiltakinum mánakvøldið er Gunnar Nolsø orðstýrari og fer samstundis at leggja upp til kjak. Dánjal Petur Højgaard, formaður í felagnum, fer at tosa um Felagið Høganes sum hevur virkað í 26 ár. Harumframt fer Hans í Líðini at greiða frá sínum royndin og arbeiði við sluppuni Jóhannu úr Vági. Tónleikarin og tónasmiðurin, Johan Mortensen, fer at undirhalda við harmonikutónleiki. Aftaná er Café Løkshøll opin og møguleiki verður at keypa eina t-shirt við tekning av Óla P. Høganes er í dag einasta skip av sínum slag í Evropa. Í hesum sambandi fer Albert Isfeld at tosa um friðing og týdning av at varðveita m.a. skip, bygningar og umráði. Atgongumerki á 50 kr. eru at fáa við dyrnar.






**KULT**

*10 ár eru liðin síðani Kular Røtur byrjaðu. Nú verða tey aftur at hoyra*

# Kularøtur í 10 ár

**KONSERT** Stórar barna- og familjukonsertir verða í Løkshøll 30. oktober

**Runavík:** Nú fer lokið av sangskríninum við gomlum og kulum sangum, og við ungum vøkrum dreymum!

Leygardagin 30. oktober, bæði klokkan 14 og klokkan 17 verður stór barna- og familjukonsert í Løkshøll við góðum gomlum og nýggjum frískum kulum rótum.

Hóast tíð enn er til tiltakið verður, er longu greitt, at næstan øll verða har: Omman, Abbabeiggi, Kingoson, Grønir menn frá Pluto, Bilurin hjá okkum, Karin, Jógvan Hansen, Lív Næs, 10 bibbur, Beinir, Rakul Ró og barnakór.

Stuttligir klovnar fara eisini at undirhalda, eins og ungt talent framførir Michael Jackson dans.

Atongumerkini fáast longu til keyps á www.nlh.fo, í Norðurlandahúsinum og á Kunningarstovunum í Runavík, Fuglafirði, Klaksvík og Tórshavn.

Kostnaðurin er 85 kr. í forsølu, og 100 kr. við dyrnar.

# Trumfa fær býin at kóka

**MENTAN** Fríggjakvøldið 29. oktober er ætlanin at fáa alla Runavíkina at kóka. Hetta skal gerast við einum megnartiltaki, ið tey nevna TRUMFA

Snorri Brend

**Runavík:** – Hetta verður ein dagur við lívligari mentan og litríkari list av øllum slagi, siga fyrireikararnir av hesum tiltakinum.

Ætlanin er, at handlar, søvn, mentanarhús, listaframsýningar, matstøð og gistingarhús og annað fara at hava opið til midnátt.

Her verður skipað soleiðis fyri, at tann einstaki handilin fer at hava okkurt serstakt at bjóða teimum vitjandi - bæði við góðum tilboðum, men eisini við onkrari spennandi kapping.

Løkshøll verður sjálvandi eisini ein týðandi miðdepil hetta kvøldið. Her verður ein stór konsert við tónleikahugaðum klaksvíkingum - Rani Nolsøe og Steintór Rasmussen úr Frændur og Jógvan Hansen.

### FM í Jolly

Hetta serstaka tiltakið TRUMFA er partur av teim mongu og fjølbroyttu tiltøkunum, sum fara at sermerkja Runavíkina í komandi viku – FAROEXPO, ráðstevna og Mentanarvika.

Millum hesi kann nevnast tann heldur øðrvísi kappingin, sum verður í kiosk Vár. Her verður nevniliga møguleiki at gerast FM-vinnari í Jolly-drekking. Her ræður um at drekka 0,25 cl uppá tí, og so er vinningurin eitt steyp og ein kassi av Jolly til trý tey skjótastu.

Henda dagin verður eisini møguligt at keypa sær eina serstaka mentanar-køku, og aðrastaðni verður bowling-kapping við Nintendo WII. Og helst verður okkurt annað spennandi eisini á skránni.

Annars hava allir handlarnir serlig tilboð, framsýningar og annað spennandi á skránni, soleiðis at okkurt verður hjá øllum at fara til.



## Serstøk konsert og fløguútgáva

Eitt eyðkenni fyri Runavík er tann stóri áhugin fyri tónleiki millum manna. Í komandi viku fer tónleikurin eisini at seta sín dám á tiltøkini og gerandislívið í býnum.

Á konsertunum vikuskiftini 29. og 30. oktober verða bæði Kular Røtur, Frændur, Millum Frændur, Jógvan Hansen, Steintór Rasmussen og aðrir góðir sangarar og tónleikarar úr Klaksvík at hoyra og síggja.

Í næstu viku kemur eisini nýggj fløga á marknaðin við bólkinum Kular Røtur. Her er talan um 10 nýggjar sangir, sum eisini verða at hoyra á konsertunum.

Tað er nøkur ár síðani bólkurin Millum Frændur var at hoyra á eini konsert. Nú verður høvið aftur til hetta, men sum skilst er ikki vist, at teir í hesum bólkinum fara at framføra so ofta saman aftrat.